Kappingareftirlitið

**Fuglafjarðar kommuna**

**Ennisvegur 38**

**530 Fuglafjørður**

J.nr. 17/00071

Tórshavn, 31.05.2017

**Loðsbátatænstuvirksemi í Fuglafirði**

Við hesum skrivi verður váttað, at Kappingareftirlitið hevur móttikið svarskriv frá Fuglafjarðar kommunu dagfest hin 10. mai 2017.

Kappingareftirlitið skilir, at Fuglafjarðar kommuna hevur valt at taka avgerðina hjá Kappingareftirlitinum til eftirtektar og hevur ógilda býráðssamstyktina frá 27. november 2014, har avgjørt var at *"biðja Havnarmeistaran um at skipa so fyri, at "Pilot" verður fyrsta val til loðs og oljusperrutænastur."*

Kappingareftirlitið skilir avgerðina hjá kommununi soleiðis, at kommunan er samd við Kappingareftirlitinum í, at loðsbátatænastufeløg, ið halda fyrisett krøv í lóggávuni, skulu hava javnbjóðis atgongd at veita loðsbátatænastur í Fuglafirði. Hetta merkir millum annað, at loðsskyldug skip, og skip, ið biðja um loðs, ikki skulu verða forðaði í at velja tann loðsbát, ið tey ynskja. Hetta treytar sjálvsagt at viðkomandi loðsbátur er góðkendur av Sjóvinnustýrinum og megnar at yvirhalda ásettu tíðarfreistir, sbrt. §§ 3 og 4 í kunngerð nr. 153 frá 21. desember 2012.

Kappingareftirlitið ynskir í hesum sambandi at fáa dokumentatión fyri, at avgerðin um at ógilda býráðssamtyktina frá 27. november 2014 hevur fingið virkna. T.d. hvørji boð eru givin Fuglafjarðar havn hesum viðvíkjandi.

Tá Kappingareftirlitið hevur fingið neyðuga dokumentatión til vega, er ætlanin at niðurleggja málið.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

deildarstjóri

Rúni J. Niclassen

Fulltrúi